# Veraldarteaturdagurin 27. mars 2000

Fyri meira enn tveytúsund árum síðani læt Euripides í leiki sínum Elektru siga: »Hvussu skal eg byrja mína ákæru? Hvussu skal eg enda hana? Hvat skal eg siga miðskeiðis í henni?«

Í hesi tíð við kávalæti og innantómari talu, hvar hildið verður rættast at tosa uttanum, heldur enn at siga nakað bart út, hevur rópið frá dóttir Agamemmnon ikki mist sín týdning.

Er tað ikki júst hetta, ið er uppgávan hjá leiklistini: At ákæra, døma, provokera, órógva?

Rákið, ið vit alla tíðina leita eftir – tað universella, tað til eina hvørja tíð algilduga, globaliseringin, ið hóttir við at skerja heimin, so hann at enda verður ein lítil bygd, har alt líkist – lættir sanniliga ikki um uppgávuna hjá leiklistini í okkara samfelag, undirgivið og kúgað av tveimum-trimum veldugum mentunarskrímslum, ið vilja leggja alt undir seg við sínum einaráðandi veldi.

Verður ómettandi strembað eftir, at alt skal líkjast, líkist alt at enda ongum.

Nei, frískleikin í byrjanini av okkara triðja ártúsundi, verður heldur at finna í teimum lágmæltu røddunum, ið nú allastaðni hevja seg móti órættinum, røddir við sama undirstøði sum sjónleikurin: At lyfta upp menniskjans innaru lyndiseyðkenni og mynda tey soleiðis, at tey verða ein felagskensla í øllum heiminum. Hesar lágmæltu røddir hoyrast úr Skotlandi, Írlandi, Suðurafrika, Quebec, Noregi og Ný Zeelandi. Allastaðni hoyrast mótmælini. Viðhvørt hava røddirnar ein málburð, ið als ikki at alheimligur, gamaní, men tónalagið er í hvussu er ekta! Og tær tala til hvønn og ein, tí at tær longu frá byrjan av venda sær til ein ávísan lurtara, ein ávísan áskoðara, ið ávirkar av at kenna sína egnu sinnisrørslu og líðing aftur, ein áskoðara, ið kann gráta um seg sjálvan og flenna at sær sjálvum. Og á tann hátt kennir allur heimurin seg eisini aftur: myndin líkist frá byrjan.

Fyri tað alment galdandi í einum leiki, er ikki so umráðandi, hvar leikurin er skrivaður, men týdning hevur tað menniskjansliga bráið, tað, hann hevur at siga, tað vakra í bygnaðinum av leikinum. Rithøvundarnir verða ikki meira alheimligir, um teir teira í París ella New York heldur enn Chicoutimi ella Port-au-Prince.

Alheimligur verður tú, tá tú sigur frá tí, tú sjálvur kennir, fyri einum áskoðara, ið er til reiðar at rannsaka og at síggja seg sjálvan upp á gott og ónt, og tá tað við gandamegini í sjónleikinum – ja, og við sannari trúgv í tínum orðum – eydnast tær at syngja um og lýsa mannasálina, granska hennara loynidómar og geva henni alt sítt ríkidømi aftur.

Tjechov er ikki alheimligur, bara tí hann er russi, men tí at hann meistarliga lýsir tað russisku sálina, sum øll heimsins menniskju kenna aftur í sær sjálvum. Hetta er galdandi fyri øll flogvit, eisini teir dramatikarar, ið vanliga verða skýrdir sum »góðir«. Hvør einasta replikk, ið verður skrivað av einum rithøvunda onkrastaðni í verðini er alheimslig, um hon rúmar tað grundleggjandi skríggið frá Elektru: »Hvussu skal eg byrja mína ákæru? Hvussu skal eg enda hana? Hvat skal eg siga miðskeiðis í henni?«

**Michael Tremblay**
**St-Adolphe d'Howard,**
**tann 24. juli 1999**

# Trygdin ikki nóg góð í norskari oljuvinnu

*Trygdin í norsku oljuvinnuni er ikki nógv betrur, enn hon var tá Alexander Kielland koppaði fyri 20 árum síðani – 27. mars 1980.*

Tað er ein trygdarkanning, sum slær fast, at støðan ikki er nógv betri í dag, enn í 1980.

Kanningin bleiv almannakunngjørd nú um dagarnar. Stjóri fyri Oljedirektoratet, Gunnar Berge, fyrrverandi oljuráðharri, váttar fyri ein part, at støðan ikki er nóg góð.

Við norska útvarpið sigur hann, at trygdin var í hásæti í mong ár, men at tað sær út til, at ávís linking er at hóma í dag.

**jhg**

Viðmerking frá Føroya Lærarafelag:

# Felags ráðlegging og fyrireiking

*Tá ið tosið millum fólk fellur á skúla og arbeiðið hjá lærarum, fæst ofta tann fatan, at lærarin hevur nógva frítíð, og veit ein ikki betur, kann tað eisini tykjast so*



Argja Skúli

**Eftir áheitan frá Føroya Lærarafelag endurprenta vit greinar, sum hava staðið í Skúlablaðnum, sum herfyri varð sent í hvørt hús í landinum**

Í upplegginum til sáttmálasamráðingirnar millum figgjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag er eitt av krøvunum, at av teimum 27 skyldigu tímunum skulu 2 nýtast til samstarv, tí at nýggja lógin hevur álagt læraranum fleiri og broyttar uppgávur. Tá ið tosið millum fólk fellur á skúla og arbeiðið hjá lærarum, fæst ofta tann fatan, at lærarin hevur nógva frítíð, og at arbeiðið er einans teir 27 tímarnir, hann undirvísir, og veit ein ikki betur, kann tað eisini tykjast so.

Til tess at gera arbeiðið hjá læraranum meira sjónligt, eru nýggir tankar komnir inn í fólkaskúlan. Samfelagið er í støðugari broyting, og hevur hetta eina sjálvsagda ávirkan á skúlan. Høvuðstankarnir eru opinleiki, samstarv og at taka støðið í einstaka næminginum.

Sereyðkenni fyri lærarayrkið hevur verið ,at lærarin sjálvur kundi avgera nær, hvar og hvussu hann fyrireikaði sína undirvísing. Til ber at siga , at við teirri nýggju lógini er hetta "frælsið" tikið frá læraranum.

**Samarbeiði eitt lógarkrav**

Í grein 14 í nýggju fólkaskúlalógini stendur m.a., at úrtøka næminganna skal javnan verða eftirmett. Henda eftirmeting, ið er sameindur partur av undirvísingini, skal vera støðið undir teirri leiðbeiningini, tann einstaki næmingurin fær, og undir ráðlegging av komandi undirvísing. Í grein 21 í lógini stendur m. a., at álagt verður leiðslunum at tryggja, at lærarar skúlans ráðleggja og fyrireika undirvísingina í einstøku flokkunum, so at allir næmingar kunnu fáa sínar avbjóðingar, og at undirvísingin verður lagað til tann tørv og fortreytir hjá tí einstaka næminginum. Víðari verður sagt, at á hvørjum floksstigi og í hvørjari lærugrein samarbeiða lærarar og næmingur javnan um at áseta tey mál, roynt verður at náa. Arbeiði næmingsins verður lagt til rættis við atliti at hesum málum. Nú ber til at spyrja, hvat nýtt er í hesi lógini? Hava lærarar ikki altíð ráðlagt og eftirmett? Jú, sjálvandi hava teir tað. Tað nýggja í lógini er, at samarbeiði er vorðið eitt lógarkrav. Nú skal lærarin ráðleggja og fyrireika undirvísingina saman við øðrum lærarum, næmingum og heimunum. Fyrr var hann í mestan mun einsamallur um henda part av yrkinum og ráddi sær sjálvum. Til ber at siga, at við hesi lógini verður tann privatpraktiserandi einalærarin avtikin við lóg, sjálvt um hann nógva staðni longu var avtikin í praksis.

**Læraratoymi**

Nýggja lógin leggur upp til, at skúlarnir skipa læraratoymi (team), har lærarar í felag ráðleggja og fyrireika undirvísingina og arbeiðið, sum annars er í og rundan um ein skúlaflokk. Vanliga eru millum 3 og 6 lærarar í einum toymi. Týdningarmiklasta arbeiðið hjá einum læraratoymi er at gera eina ársætlan fyri undirvísingina í tí ávísa flokkinum og at fylgja henni upp. Ársætlanin sigur frá tankum og ætlanum av námsfrøðiligum og undirvísingarligum slag. Hon skal skapa eina heild í undirvísingina. Sum skilst er ársætlanin grundarlagið undir allari fyrireikingini í flokkinum, og er hon ein fyritreyt fyri, at til ber at undirvísa í tvørfakligum evnum og spurdómum og at til ber at gera verkætlanararbeiði, sum eisini er eitt krav.

Fyrireikingararbeiði til ársætlanina byrjar millum næmingarnar í flokkinum, áðrenn arbeitt verður víðari við henni í toyminum. Tað hevur eisini týdning, at foreldrini fáa møguleika at ávirka ársætlanina. Hetta kann so aftur opna fyri einum dialogi millum heim og skúla. At enda skal ársætlanin leggjast fyri leiðsluna í skúlanum. Til tess at fylgja upp tí, sum er sett út í kortið í ársætlanini, er neyðugt at læraratoymið javnan kemur saman. Tað er ymist frá einum toymi til annað, hvussu nógvir fundir eru í einum skúlaári.

**Flokslærarin**

Hvat kann so verða at ráðleggja um? Tvørfaklig evni,verkætlanararbeiði, evnisvikur, seturskúli, foreldrasamarbeiði, felags reglur, ábyrgdarøki og tíðarætlan. Afturat sjálvari undirvísingini skal flokslærarin taka sær av trivnaðinum í flokkinum. Her er eisini neyðugt at samarbeiða við hinar lærararnar í flokkinum. Flokslærarin skal hava samrøður við hvønn einstakan næming, hesar skulu so aftur verða grundarlag fyri foreldraviðtalurnar. Minst eina ferð árliga skal flokslærarin, saman við hinum lærarunum, sum hava ein flokk, hava fund við skúlans leiðslu, har ársætlanin verður eftirmett, úrtøka næminganna verður viðgjørd, hvat er viðgjørt á toymisfundum, hvussu samarbeiðið hevur gingið og um sociala trivnaðin í flokkinum.

Sum sæst, skal lærarin nýta nógva tíð og orku útyvir tíðina, hann undirvísir og fyrireikar sína egnu undirvísing. Tveir skemalagdir tímar til hetta má verða eitt minsta krav.





# Gøtusjónleikur á Ólavsøku



Í samband við 1000-ára haldið fyri at Føroyar vórðu kristnaðar, er ætlanin at Meginfelag áhugeleikara Føroya (MáF) og Leikarafelag Føroya (Gríma) skulu skipa fyri gøtusjónleiki á Ólavsøku. Onkur bólkur er longu farin í gongd við at venja. Men annars kunnu øll, bólkar ella einstaklingar, sum hava hug at vera leikarar, venda sær til MáF ella Grímu innan 10. apríl. Venjingarnar byrja fyrs tí mai mánaða, um nóg nógv tekna seg. Tað er sera umráðandi at luttakararnir hava hug at brúka summarfrítíðina til hetta burturav.

Tvær ferðir áður, í1991 og 1994, hevur verið gøtusjónleikur á Ólavsøku og hava bæði tiltøkini eydnast sera væl.

Tiltakið í ár verður skipað soleiðis, at feløg ella bólkar venja hvør í sínum lag í heimbygdini ella býnum og 1-2 vikur undan framførsluni, verða leikirnir samskipaðir í Havn. Alt eftir hvussu nógvir bólkar eru við, verður eitt »høvuðs«-leikrit skrivað. Hvør bólkur ger sjálvur av, um spælt verður úr egnum tilfarið, ella um okkurt verður valt út til tey.

Gríma og MáF hava vhør sína heimasíðu: www.grima.fo og www.maf.fo

# Suni Vinther leggur frá sær



Í morgin, hósdagin 30. mars, hevur Súni Vinther sín seinasta arbeiðsdag sum varðapolitiinspektørur. Starvið hevur verið lýst leyst, og var freistin úti fyri umleið tveimum vikum síðani - og um ein vika ella so fer at ganga, áðrenn meira verður at frætta um, hvør nýggjur varðapolitiinspektørurin verður.

Í sambandi við seinasta arbeiðsdagin hjá Súna Vinther, verður boðið kaffi millum klokkan 15 og 17.

# Vel GSM-haldið. ið tær hóskar best

*Føroya Tele fór frá fríggjadegnum at bjóða kundunum nýggj GSM-hald*



Haldini eru tillagaði soleiðis at tey betur nøkta tørvin hjá tí einkulta kundanum. Møguleiki verður fyri at velja millum eitt av fylgjandi haldum:

- Vinnuhald
- Vanligt hald
- Frítíðarhald

Eyðkennið við vinnuhaldinum er tað lága samtalugjaldið, sum er galdandi alt samødgrið. Vinnuhaldið vendir sær, sum navnið sigur, til vinnufólk, sum serliga brúka telefonina um dagin, og sum til eina og hvørja tíð vilja hava samband við viðskiftafólk og starvsfelagar. Eisini er hópurin av eykatænastum knýttur til vinnuhaldið, m.a. dataflutningur.

Vanliga haldið er til teira, sum sjálvi ynskja at seta haldið saman av teimum tænastum, sum eru til taks, og har nýtslan er javnt býtt millum dagin og kvøldið.

Umframt at brúka fartelefonina í Føroyum, kann telefonin, um tú hevur vinnuhald ella vanligt hald eisini brúkast hjá øllum teimum kervisveitarum, sum Føroya Tele hevur avtalur við.

Frítíðarhaldið er, sum navnið sigur, best egnað til teirra, sum hava tørv á fartelefonini í frítíðini, hetta merkir, at samrøðurnar eftir kl. 18 og sunnudagar eru bíligar, eisini er frítíðarhaldið bíligt í stovning og mánaðargjøldum.

Niðanfyri er ein talva, sum vísir gjøldini á teimum ymisku haldunum. Stovningin av tí vanliga haldinum kostar tó 647 kr., um man sjálvur velur eitt telefonnummar. Prísurin á umskifti av haldinum veldst um hvat hald tú hevur og hvat hald tú ynskir, nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi sæst á www.tele.fo

| | Vanligt hald kr. | Vinnuhald kr. | Frítíðarhald kr. |
|---|---|---|---|
| Stovning | 500 kr. | 700 kr. | 300 |
| Mánaðargjøld | 115 kr. | 200 kr. | 75 |
| Samrøður – dag | 2,40 kr. | 1,60 kr. | 4,00 |
| Samr. – kvøld/nátt | 1,40 kr. | 1,60 kr. | 0,90 |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. | 0,40 kr. | 0,40 |







# FERÐAÆTLAN SUMMARIÐ 2000

Tyrlutænastan

| Mikudag | Fr fer |
|---|---|
| Vágar | 09.30 |
| Gásadal | 09.36 |
| Mykines | 09.42 |
| Vágar | 09.53 |
| Vágar | 10.30 |
| Koltur | 10.37 |
| Tórshavn | 10.42 |
| Klaksvík | 10.54 |
| Svínoy | 11.06 |
| Kirkja | 11.10 |
| Hattarvík | 11.13 |
| Klaksvík | 11.31 |
| Klaksvík | 12.30 |
| Tórshavn | 12.42 |
| Skúvoy | 12.57 |
| Dímun | 13.02 |
| Froðba | 13.11 |
| Froðba | 14.00 |
| Dímun | 14.09 |
| Skúvoy | 14.14 |
| Tórshavn | 14.29 |
| Koltur | 14.34 |
| Vágar | 14.41 |

| Fr ggjadag | Fr fer |
|---|---|
| Vágar | 09.30 |
| Gásadal | 09.36 |
| Mykines | 09.42 |
| Vágar | 09.53 |
| Vágar | 10.45 |
| Koltur | 10.52 |
| Tórshavn | 10.57 |
| Skúvoy | 11.12 |
| Dímun | 11.17 |
| Froðba | 11.26 |
| Froðba | 12.10 |
| Dímun | 12.19 |
| Skúvoy | 12.24 |
| Tórshavn | 12.36 |
| Klaksvík | 12.48 |
| Svínoy | 13.00 |
| Kirkja | 13.04 |
| Hattarvík | 13.07 |
| Klaksvík | 13.25 |
| Klaksvík | 14.10 |
| Tórshavn | 14.22 |
| Koltur | 14.27 |
| Vágar | 14.32 |
| Gásadal | 14.38 |
| Mykines | 14.44 |
| Vágar | 14.56 |

| Sunnudag | Fr fer |
|---|---|
| Vágar | 13.30 |
| Gásadal | 13.36 |
| Mykines | 13.42 |
| Vágar | 13.53 |
| Vágar | 14.15 |
| Koltur | 14.22 |
| Tórshavn | 14.27 |
| Skúvoy | 14.42 |
| Dímun | 14.47 |
| Skúvoy | 14.52 |
| Tórshavn | 15.07 |
| Klaksvík | 15.19 |
| Klaksvík | 15.55 |
| Svínoy | 16.07 |
| Kirkja | 16.11 |
| Hattarvík | 16.14 |
| Klaksvík | 16.32 |
| Tórshavn | 16.44 |
| Koltur | 16.49 |
| Vágar | 16.56 |

**B legging**

**Tlf. 333410 · Fax 333380**
Mánadag - Fríggjadag
**kl. 08.00 - 16.00**
Sunnudag
**kl. 12.00 - 16.00**

**B¿rn**

0 - 6 ár: Ókeypis
7 -13 ár: 50%

**Vi f¿ri**

Í mesta lagi 20 kg.

Ferðaseðlakostnaður við Tyrluni

| Prísir | Mykines | Gásadal | Vágar | Koltur | Tórshavn | Skúvoy | Dímun | Froðba | Klaksvík | Svínoy | Hattarvík | Kirkja |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mykines | | 85,- | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Gásadal | 85,- | | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Vágar | 145,- | 145,- | | 130,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Koltur | 290,- | 290,- | 130,- | | 85,- | 215,- | 215,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- |
| Tórshavn | 215,- | 215,- | 215,- | 85,- | | 130,- | 130,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- |
| Skúvoy | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | | 85,- | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Dímun | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | 85,- | | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Froðba | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 85,- | 85,- | | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Klaksvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | | 110,- | 110,- | 110,- |
| Svínoy | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | | 110,- | 110,- |
| Hattarvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | | 85,- |
| Kirkja | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | 85,- | |

**- galdandi 1. apr. - 1.nov. 2000**

Atlantic Airways
Tlf. 333410 · Fax 333380

SANSIR · TEL 355 355